

**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

# Góður dagur í ríkisfelags-skapinum

*Ein bankakreppa er ongantíð ein sólskinssøga. Hon setir síni djúpu spor í alt samfelagið, og tí er stóra avbjóðingin at finna loysnir, sum avmarka tapini*

Fyri at tryggja okkum ímóti ringast hugsandi avleiðingunum av eini møguligari bankakreppu, samtykti løgtingið, fyri tveimum árum síðani, at seta fyrsta av trimum bankapakkum í gildi fyri Føroyar. Hetta varð gjørt, fyri at skapa álit á bankarnar. Bankapakki I skuldi tryggja, at eingin misti innistandandi pening, um ein banki fór av knóranum.

Tað var eitt samt løgting, sum avgjørdi at seta bankapakka I í gildi fyri Føroyar. Tó vístu Tjóðveldi og Miðflokkurin á, at eftir teirra tykki høvdu føroysku bankarnir ikki so nógv brúk fyri bankapakkunum, tí teir høvdu ikki sett seg í somu vandar, sum danskir bankar. Flokkarnir søgdu, at hetta fór at hava við sær, at føroysku bankarnir vórðu noyddir at gjalda inn í eina skipan, sum hevði til endamáls at bjarga donskum bankum.

"Enn einaferð eru tað tey, ið ikki hava tikið lut í ella fingið vinning av spekulasjón og virðisflutningi, ið skulu gjalda fyri, at tey, ið hava fingið vinning, verða bjargað", søgdu flokkarnir í álitinum til uppskotið.

Hetta gjørdist tó ikki veruleikin. Føroysku peningastovnarnir vóru als ikki uttanfyri vandastøðu, og tær útreiðslur, sum bankarnir hava havt av bankapakkunum, eru ikki farnar til at bjarga partaeigarunum, tí teir hava allir mist sítt.

Men kundarnir hjá Eik hava einki mist. Teir kunnu framvegis fara inn á allar deildir bankans og avgreiða síni bankaørindi. Har møta tey somu starvsfólkunum, sum vóru har áðrenn bankakreppuna, og allir pengarnir sum tey áttu á bók, eru framvegis har. Kundarnir hava einki mist orsaka av bankakreppuni. Landskassin bleiv heldur ikki noyddur at seta pengar í bankan, sum annars kundi verið ein avleiðing, og bankin bleiv ikki avviklaður (tað hevði verið ein vannlukka).

Tilboðið frá donsku stjórnini, um at seta bankapakkarnar í gildi fyri Føroyar, hevur virkað eftir ætlan. Harumframt hevur gott samskifti millum landsstýrið og donsku stjórnina, verið viðvirkandi til úrslitið. Enn einaferð mugu vit staðfesta, at samstarv er vegurin fram.

Høvdu vit harafturímóti yvirtikið fíggjarøkið og fíggjareftirlitið, so sum CHE-samgongan arbeiddi við, so hevði støðan í dag verið ein heilt onnur.

Meðan CHE-samgongan bjóðaði yvirtøkur og ruðuleika, so bjóðaði ABC-samgongan fíggjarligt støðufesti, og tað kunnu vit øll fegnast um.



**Dagfinnur Danbjørg**

# Samgongusamstarv fyri at forða ella fyri at fremja

Jóannes segði í SVF m.a., at hann helt áfram í ABC fyri framhaldandi at forða høgrapolitikkinum hjá AB, sum hann annars higartil ikki í praksis hevur klárað at gjørt

AB hevur harafturímóti brúkt C sum legitimatión fyri førda høgrapolitikkinum.

Tí teir hava brúkt C og kanska einamest Jóannes sum "praktisk gris" í fremjingunum av niðurskurunum innan almanna-, heilsu- og skúlaverkið, sum annars - saman við verju av arbeiðara- og fiskimannarættindum og korum - upprunaliga vóru hornastreinar og skjaldramerki floksins undir yvirskriftini: frælsi, javnaður og brøðralag. Arvasilvurið, verður nú bert tikið fram og pussað, til framvísingar upp til val, men síðani eftir valið verður tað væl pakkað inn og læst niður aftur í somu skuffu, sum tað varð tikið upp úr.

Í staðin fyri at fyrigykla fólki, at hann er ein forðing fyri høgrapolitikkinum, sum hann als ikki er, heldur tað mótsatta, so áttu hann og C sjálvandi í verki at stríðst fyri einari fremjing av grundhugsjónarmálum floksins.

Men forðingina - saman við AB - ber til at loysa, um vilji er til tess. Møguleikin hevur verið har, og møguleikin er har. Tað krevst bara vilji og politisk støðufesti til tess, og so tað - ið kanska er tað ringasta at klára - at seta floksins áhugamál fram um egin áhugamál. Og floksins áhugamál kunnu til eina og hvørja tíð røkjast væl betur saman við DEH enn við AB. Tí í hesum trimum flokkunum er nógv størri samanfall millum tað, ið javnaðarflokkurin eigur at standa fyri og vil fremja, og tað, hesir tríggir eisini vilja fremja.

Tí bert við at fremja progressivar hugsjónir í verki, forðar tú teimum reaktionæru.



**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*

# Rósa Samuelsen givið skeivar upplýsingar?

*Verða 6 røktarpláss í Eysturoy niðurløgd vegna sparingar, hevur Rósa Samuelsen landstýriskvinna givið løgtinginum skeivar upplýsingar*

Nú hómast ein loysn viðvíkjandi røktarheimsplássunum í Suðuroynni, meðan tey 6 røktarheimsplássini í Eysturoynni verða niðurløgd, ella sagt við øðrum orðum spard burtur.

Tá ófráboðaðir fyrispurningar vóru í Løgtinginum mikudagin, hevði Hans Pauli Strøm løgtingsmaður ein fyrispurning til løgmann. Hans Pauli veitraði við einum skjali, sum hann segði var ein avtala millum samgonguflokkarnar, at broytingarnar í Suðuroynni skuldu gerast stigvíst og harvið tryggja, at starvsfólk ikki blivu søgd úr starvi.

Løgmaður tók samanum og segði, at sjálvsagt skuldu gjørdar avtalur haldast. Hervið taki eg sum givið, at trupuleikin við spariætlanunum á eldraøkinum í Suðuroy, fáa eina virðiliga loysn.

Á nevnda tingfundi spurdi eg Rósu Samuelsen, um hon ikki hevði givið mær skeivar upplýsingar, tá hon í svari til fyrispurning greiddi frá, at eldratænastan eftir umleggingina í Eysturoynni frá røktarplássum til sambýlispláss ikki bleiv verri.

Verðuleikin er, at hoyringskriv til uppsagnir eru sendar starvsfólkunum sum verða rakt, nú tey seks røktarplássini í Eysturoynni eftir ætlan verða niðurløgd. Landstýriskvinnan heldur fast við avgerðina, hóast stýrið fyri Eysturoyar Røktar- og Ellisheim saman við øllum borgarstjórunum í Eysturoynni staðiliga hava mótmælt, tí endaliga úrslitið verður, at 6 færri røktarpláss verða eftir í Eysturoynni, har fleiri enn 100 fólk standa á bíðilista.

Landstýriskvinnan hevur fyrr sagt, at spariætlanin varð send til hoyringar, og tá ongin svaraði gekk hon út frá, at undirtøka var fyri ætlanini. Tí er mín niðurstøða, at Sambandsflokkurin, sum hevur fýra tingfólk ella helmingin av tingmanningini úr Eysturoynni, Alfred Olsen, Helgi Abrahamsen, Edvá Jacobsen og Edmund Joensen, stuðla ætlanunum hjá Rósu niðurleggja 6 røktarpláss.

Sama er galdandi fyri Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin.

Verðuleikin er, at hoyringskriv til uppsagnir eru sendar starvsfólkunum sum verða rakt, nú tey seks røktarplássini í Eysturoynni eftir ætlan verða niðurløgd. Landstýriskvinnan heldur fast við avgerðina, hóast stýrið fyri Eysturoyar Røktar- og Ellisheim saman við øllum borgarstjórunum í Eysturoynni hava mótmælt hesi skilaleysu avgerð.

Borgarstjórin í Eysturkommunu hevur fráboðað, at teir ikki meta seg at hava umstøður at átaka sær størri útreiðslur til rakstur á eldraøkinum, tí teir eru tann kommunan í landinum, ið fyri hvønn íbúgva, hevur gjørt størstu íløgur til røktar og sambýlispláss. Tí er tað ikki Eysturkommuna sum eigur "Svartaper".

Avgerðarrættin hevur ongin annar uttan Rósa Samuelsen og ABC-samgongan. Tí mugu tit eisini vísa ábyrgd og sjálvi taka avleiðingarnar.